Útbjóðingarskriv

## Miðlagrafikara tænasta til Nám

Nám bjóðar hervið ein part av miðlagrafikaratænastuni út.
Uppgávan er at gera stuðlandi margmiðlatilfar í sambandi við tilfarið, ið Nám framleiðir t.d. filmar, ljóðupptøkur, ljóðpoddar v.m.

## Uppgávan

Í samráð við leiðslu og starvsfólk í Námi fremur miðlagrafikarin tær uppgávur, sum ásettar verða av Námi. Í høvuðsheitum er talan um uppgávur á hesum øki:

- ger av margmiðlatilfari at brúka í undirvísingarhøpi
- kunnandi tilfar til nýtslu hjá Námi
- annað margmiðlatilfar, ið er partur av arbeiðsøkinum hjá Námi

Miðlagrafikarin samskipar royndarkoyring av teimum uppgávum, ið gjørdar verða. Royndarkoyringin skal veita trygd fyri, at arbeiðsuppgávan er loyst, og lýkur krøvini, sum Nám ásetir í hvørjum einstøkum føri. Miðlagrafikarin ger saman við starvsfólkunum í Námi neyðugar broytingar og tillagingar í uppgávunum, um royndarkoyringin vísir at tørvur er á.

## Grundleggjandi krøv

Tað er krav, at viðkomandi er útbúgving margmiðlasmiður ella hevur samsvarandi útbúgving.
Viðkomandi skal hava minst 3 ára royndir við margmiðlauppgávum.

## Væntaða tímatalið og arbeiðsstaður

Tímatalið er vanliga árliga umleið 900 tímar, arbeiðsstaðurin er í Námi, tó er møguligt at loysa uppgávurnar á egnari fyritøku, um miðlagrafikarin er partur av eini fyritøku. Nám tilskilar sær rættin at minka um árliga tímatalið, samsvarandi virkseminum í Námi og endaliga tímaprísunum.

## Krøv til miðlagrafikarin

Miðlagrafikarin skal vera ein nevndur persónur. Um talan er um fyritøku, ið velur at bjóða, so skulu vit hava navnið á persóninum, sum stendur fyri uppgávuni.

Tú byrjar 1. apríl 2026
Vit skulu hava 3 ára skjalprógvaðar royndir við uppgávum sum miðlagrafikari. Og skulu hava vit hava upplýst:

- navn og CV
- navn og skrásetingarnummar hjá fyritøku
- prís pr. tíma uttan mvg
- frágreiðing um, hvussu omanfyri nevndu krøv verða lokin
- yvirlit yvir hvørjar kundar viðkomandi hevur royndir við
- frágreiðing um viðkomandi uppgávur nevndi persónur hevur loyst
- tilvísing frá kundum seinastu 2 árini.

## Meting av tilboðum

Nám brúkar fylgjandi vekt:

1. Prísur 50%
2. Góðska/førleikar 50%
    a. Viðkomandi uppgávur 20%
    b. Viðkomandi førleikar 30%

Sáttmálin verður tillutaður sambært ásettu tillutanartreyt, sum er fíggjarliga mest skynsama tilboðið í mun til prís og góðsku/førleikar.

Nám skilar sær rættin til ikki at taka av nøkrum tilboði, um tað liggur uttanfyri fíggjarligu karmarnar hjá Námi.

## Hvussu verður vekta

Øll tilboð, sum lúka form- og minstukrøv, fáa millum 0 - 50 stig fyri prísin.

Tilboðið við lægsta prísinum pr. tíma fær 50 stig. Hini tilboðini fáa stig í mun til lægsta prís pr. tíma.

Um prísurin pr. tíma er lægri enn 250 kr. pr. tíma uttan mvg, verður prísurin settur til 250 kr. í samanberingini við aðrar prísir.

Førleikar eru býttir upp í tilvísingar fyri:

a. Viðkomandi uppgávur 20%
b. Viðkomandi førleikar 30%

a. Viðkomandi uppgávur

Viðkomandi uppgávur eru at gera stuðlandi margmiðlatilfar í sambandi við tilfarið, ið Nám framleiðir t.d. filmar, ljóðupptøkur, ljóðpoddar v.m.

Frágreiðingar um viðkomandi uppgávur verða mettar ein og ein og fáa millum 0 - 20 stig fyri prísin.

20 stig kunnu vera givin fyri tvær "sera" viðkomandi uppgávur, og 0 stig fyri ongar viðkomandi uppgávur. Tað verður mett positivt meira viðkomandi uppgávurnar eru.

b. Viðkomandi førleikar

Út frá upplýsingum um viðkomandi førleikar geva vit millum 0 - 30 stig. Fult stigatal geva vit fyri viðkomandi margmiðlasmið útbúgving ella aðra líka viðkomandi útbúgving, partvís stig verða givin fyri førleikar uttan útbúgving og 0 stig verða givin fyri ongar viðkomandi førleikar. Jú meira viðkomandi førleikin er, jú hægri stigatal fær førleikin.

Samlað meting

Tá ið tilboðið er mett sambært tillutanartreytunum, verður ein samlað meting framd, sum er grundað á stigini, sum eru givin sambært tillutanartreytunum.

Dømi um samanberingar av tilboðum er lýst niðanfyri:

**Tilboð 1:**

Miðlagrafikarin hevur havt tvær "sera" viðkomandi uppgávur. Hetta gevur 20 stig.

Miðlagrafikarin hevur eina yrkis útbúgving, men ongar royndir. Hetta gevur 0 stig.

Viðkomandi bjóðar ein prís pr. tíma á 250 kr. uttan mvg. Av tí, at 250 kr. er lægsti prísur, gevur hetta fult stigatal: 50 stig.

Stig til samans: 70 stig.

**Tilboð 2:**

Tilboðsgevarin hevur havt tvær "sera" viðkomandi uppgávur. Hetta gevur 20 stig.

Viðkomandi er ikki faklærd/ur men hevur verið i starvi, sum ófaklærd/ur margmiðlasmiður. Hetta gevur 10 stig.

Viðkomandi bjóðar ein prís pr. tíma á 275 kr. uttan mvg. Av tí, at prísurin verður settur í mun til lægsta prís, sum er 250, verður stigatalið: 45 stig.

Stig til samans: 75 stig.

**Tilboð 3:**

Miðlagrafikarin hevur havt tvær "sera" viðkomandi uppgávur. Hetta gevur 20 stig.

Margmiðlasmiðurin er útlærdur og hevur starvast innan yrki. Hetta gevur 30 stig.

Viðkomandi bjóðar ein prís pr. tíma á 325 kr. uttan mvg. Av tí, at prísurin verður settur í mun til lægsta prís, sum er 250, er stigatalið: 38 stig.

Stig til samans: 88 stig.

## Hentar upplýsingar

Tilboðsgevari kann senda skrivligar spurningar til **eydun@nam.fo**

Spurningar, ið eru settir fyri fríggjadagin 6. mars 2025, kl. 16.00, verða svaraðir í seinasta lagi mikudagin 11. mars 2026, kl. 16.00.

Spurningar verða svaraðir skrivliga. Allir spurningar og svar kunnu síggjast dulnevnd á keypsportal.fo

Tilboðsfreist og teldupostadressa

Freist **16. mars 2026**.

Tilboð skulu sendast til **eydun@nam.fo**